# men vit mugu víðari



*- Eg havi sjálvur koyrt gjøgnum heimsins longsta undirsjóvartunnil í Noregi. Tað tók bara góðar 20 minuttir, sigur Tórálvur*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

> *Teir søgdu, at hetta var eitt brimpláss. Men har vóru eisini aðrir skilamenn sum søgdu at Gamlarætt var eitt sera gott stað*
>
> *(Tórálvur Mohr Olsen, Sandur)*

Tað var tó ikki staðið Gamlarætt sum menn tosaðu harðast um at byrja við. Hildið var rættast at gera hesa íløguna í Kirkjubø, men hetta møtti sum vera man stórari mótstøðu.

- Eg minnist, at tað komu skriv ymsastaðni frá, eins og fólk í hópatali mótmæltu hesi ætlanini. Fornfrøðingar komu eisini fram og søgdu sína hugsan um hetta.

- Tja, eg veit ikki, um teir vóru bidnir um at gera hetta ella ikki. Teirra fatan var í øllum førum greið, at vit máttu ikki nerta nakað, sum kundi skaða fornminnini í Kirkjubø, sigur Tórálvur við einum brosi.

### Gamlarætt eitt gott stað

Eftir nógv kjak fyri og ímóti ætlaðu ferjuleguni, kom so fram uppskotið um at leggja hesa á Gomlurætt. Og so varð.

- Skal eg siga sum er, so var hetta ein ótrúliga strævin tíð!, staðfestir hesin vísi 80 ára gamli heimasandsmaðurin.

Eftir at hetta uppskotið varð lagt fram, komu nú aðrir menn undan kavi og søgdu, at ferjulegan mátti endiliga ikki leggjast her miðskeiðis millum Velbastað og Kirkjubø. Hon kundi liggja alla aðrastaðni, - bara ikki her!

- Teir søgdu, at hetta var eitt brimpláss. Men har vóru eisini aðrir skilamenn sum søgdu at Gamlarætt var eitt sera gott stað, greiðir Tórálvur frá.

Sagt varð eisini, at her var talan um eitt kyrrupláss, millum annað hjá monnum av Velbastað. Sluppu teir ikki upp í heimbygdini, so kundu teir liggja kyrrir her og bíða eftir hóskandi líkindum.

At enda varð samtykt at henda loysnin skuldi veljast, hóast mong kanska undraðu seg eitt sindur yvir staðið.

> *Eg haldi, at tað vigaði tungt, at júst løgmaður gekk so sterkt inn fyri málinum*
>
> *(Tórálvur Mohr Olsen, Sandur)*

### Vit vóru hepnir

Eftir samtyktina í løgtinginum varð so farið til verka. Og Tórálvur og sandoyingar fegnaðust sum vera man um hesa loysnina:

Nú var ikki neyðugt longur at fara tann langa teinin úr Skopun, um Kirkjubønes og síðani til Havnar.

- Hetta var ein sera spennandi tíð. Tú skilir, at skula byggja eina ferjulegu á opnari havsíðu, - tað var ikki bara sum at siga tað, greiðir hann frá.

Tað kostaði sjálvandi pening, men spurningurin var eisini um, hvussu mundi fara at verða við kyrrindunum.

Tórálvur var við á kunnandi ferð í Danmark, har modellroyndir vórðu gjørdar av, hvussu henda ferjulegan fór at rigga undir ymiskum veðurlíkindum. Henda útgerðin var longu tá á sera høgum støði. Royndirnar vístu greitt, at hetta fór at gerast eitt kyrrupláss.

- Og satt at siga, so kundi vit seinni staðfesta at vit vóru hepnir. Tí hetta bleiv ein tann kyrrasta havnin í øllum Føroyum.

- Men tonk tær til, um man tók feil, og hon var púrasta óbrúkilig, tá hon var liðug. Jú, eg kann lova tær fyri, at hetta var ein spennandi tíð, sigur hann við einum brosi.



*- Nú mugu vit taka næsta stigið á samferðsluøkinum: Ein undirsjóvartunnil er av avgerandi týdningi fyri okkum í Sandoynni, sigur Tórálvur, við týðiligari adressu til Magni Laksáfoss*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

## Gamlarætt sum smuglarahavn!

Eitt av avgerandi sjónarmiðunum hjá sandoyingum viðvíkjandi undirstjóvartunlinum hevur verið, at hesin er ein spurningur um lív ella deyð fyri oynna.

Hinvegin vísa onnur á – millum annað fíggjarmálaráðharrin Magni Laksáfoss – at ein tunnil bjargar ikki nakrari oyggj ella øki einsamallur. Tað skal annað til, enn bert eitt slíkt fast samband.

Hesum er Tórálvur ikki heilt ósamdur í. Men hann leggur kortini dent á týdningin av einum slíkum undirsjóvartunli.

- Hinvegin er tað ein stórur spurningur um ikki ferðasambandið skapar júst tað sum skal til. Ein veit nevniliga ongatíð, hvat eitt slíkt kann kasta av sær.

- Eg hugsaði í øllum førum ikki um, at tá Gamlarætt varð gjørd, at hon skuldi enda sum ein smuglarahavn. Nei, til slíkt røkkur mín fantasi'ur ikki!, sigur hann við einum stórum brosi.